LANDSGRANNSKOÐANIN
THE NATIONAL AUDIT OFFICE OF THE FAROE ISLANDS

*Argir, 19. juni 2024*
J.nr.: LG 2023/405-015
*(at tilskila í brævi)*
Tygara skriv: j.nr.24-12031

Landsstýrismálanevndin
Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
FO 100 Tórshavn

*Stílað til: Hans Jacob Thomsen, formann*

**Viðv. klagu um embætisførsluna hjá Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu**

Víst verður til skriv frá Landsstýrismálanevndini 31. mai 2024 um klagu um embætisførsluna hjá Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu í umhvørvismálum.

Landsstýrismálanevndin spyr, um tað, í frágreiðingini um Húsalánsgrunnin, eru ábendingar um, at trupulleikar eru við langtíðarhaldførinum hjá Húsalánsgrunninum.

Í frágreiðingini er greitt frá, hvussu byggiverkætlanirnar eru fíggjaðar, og hvussu fíggingarleisturin (frymilin) er bygdur upp. Sambært frymlinum er húsaleigan samansett av byggikostnaði, fíggjarkostnaði, umsitingar- og rakstrarkostnaði, langtíðarviðlíkahaldi og grunsgjaldi.

Landsgrannskoðanin kannaði Húsalánsgrunnin við stakroyndum. Sambært stakroyndunum hevði Húsalánsgrunnurin í flestu førum slakað í kravinum um, at húsaleigan skal rinda langtíðarviðlíkahald og grunsgjald; í summum førum svaraði húsaleigan bert til fíggjarkostnað, og rakk ikki til rakstrarkostnað.

Í teimum førum, har frymilin er fylgdur, hava veruligu útreiðslurnar verið hægri. Frymilin er eitt nú bygdur á 2,75% í rentu, men seinastu árini hevur veruliga rentan verið hægri. Metingarnar, ið frymilin er bygdur á, hava tí ikki verið í samsvari við faktisku útreiðslurnar.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at tað í frágreiðingini eru fleiri og týðiligar ábendingar um, at trupulleikar eru við langtíðarhaldførinum hjá Húsalánsgrunninum.

Vinarligar heilsanir

Beinta Dam, landsgrannskoðari

TRAÐAGØTA 43 . POSTRÚM 2053 . FO-165 ARGIR
TEL +298 35 51 00 . FAX +298 35 51 01
POSTUR@LG.FO . WWW.LG.FO